Soppur í føroyskum og sopp í írskum.

Eftir *Chr. Matras.*

Hetta er roynd til at ráða gátu, sum eitt tað hvønndagsligasta orðið í føroyskum máli ber upp. Gátuevnið er hetta: Hvussu hevur *soppur* fingið ta merking, orðið nú hevur í føroyskum?

Fyrst er at bera fram tað, sum vit vita um týdning og nýtslu í okkara máli, síðan at hava fyri tað, sum onnur mál vátta, og at enda at læsa av ella taka samanum fyri eygunum á teimum, sum sæð hava allan mannagangin.

I.

Fáur er í iva um, hvørja høvuðsmerking *soppur* m. hevur í føroyskum, nevniliga «ein hond, ella so, av hoyggj,» t. d. tá ið tey geva neytum. So er eisini sagt frá í orðabókini hjá J. C. Svabo; eitt nú hevur handritið M: «*Soppur, Hojsoppur* s. m. Haandfuld Høe, manipulus foeni l. villus,» og S[1]: «*Soppur* s. m. liden Visk Høe, fasciculus foeni.» Men ikki er tað sørt, at orðið eisini er havt um annað enn hoyggj (turkað gras). Soleiðis sigur maður í Funningi í tíðindabrævi (Tingakrossur 1932 nr. 20): « . . . lønin fyri at vera uppsitari er so syndarliga lítil — tann neyðars *grassoppurin* — tað er alt.» Sagt verður eisini (hetta er á orðabókarseðli): «at *royta* ein *sopp* (úr tvæveturs jørðini)», og hitt nógv nýtta, men kanska ikki rættiliga stovubæra orðið «skoynisoppur» (í Nólsoy sagt: skeinisoppur, sbr. ísl.

skeini; á donskum æt tað sama: arsvisk, Kalkar kallar tað á latíni: anitergium) vísir tað sama. Beinleiðis «hoysoppur» er merkingin heldur ikki, tá ið vit tosa um *soppatorv*. Um hetta orðið tekur Svabo so til (Indb. III, 483): «I Kolter, hvor ingen Møgv eller Torve-Jord findes, bruger man *Soppatorv*, det er Grønsværen selv, for at spare på den gode Torv, som føres fra Sandøen» (smbr. Landt 164: *Soppa-Tørven)*. Eg kann leggja afturat, at í Norðuroyggjum er «soppatorv» eisini nevnt »lætt torv», og at Dr. Jakobsen hevur hesar uppskriftir (eg veit ikki hvaðan): «*hattatorv* = *soppatorv* = *garðatorv* (skr. gära-); *lættitorv* (lætte-), *soppatorv* t. e. við svørðinum á — tað ovasta kallaðist: svørðhøtturin». — Orðið *hoysoppur*, sum er ein sera vanlig samanseting, hava vit longu nevnt. Aðrar samansetingar, sum eg kenni, eru hesar: 1. Úr Sunnbø hevur M. A. Jacobsen skrivað upp: *soppkøstur* m., *sopptøð* n. pl. (hitt mótsetta eitur: mykjukøstur, mykjutøð). 2. Úr Kunoy er skrivað upp (M.A.J.): *lendasoppur* m. Sbr.(?) R. Rasmussen, Sær er siður á landi (1949), bls. 68: «Tá byrðan var bundin, gjørdi maður sær holu fyri høvdið undir tvørfetilin og legði sær ein sopp undir fetilin, so ikki skuldi níta ov fast at skallanum. Ein *sopp* legði hann sær undir *lendarnar*, so fór hann undir byrðuna.» 3. *sogusoppur* m. «hoysoppur, sum tey turka ella strúka innan um ílátið, ið kálvur hevur drukkið úr, og sum tey so geva honum í kjaftin at jagla og súgva burtur úr» (Poul Olsen á Eiði). John Nybo sigur mær, at í Múla eitur hetta *narrisoppur*, og eg kann nevna, at M.A.J. hevur skrivað upp eitt annað orð nýtt í somu merking: *sogustrá* n.» strá, ið ein turkar innan um ílátið og gevur kálvi.»

Í øllum tí, sum her hevur verið havt á lofti, hevur *soppur* havt merkingina «hoysoppur» ella (sjáldnari) «grassoppur». Sama er í máliskuni um barnakonu ella songarkonu, sum vit seinni skulu hoyra. Meira ivasamt er við eini samanseting, sum vit ikki hava nevnt enn, men brátt fara at taka upp til viðgerðar.

Nú leggja vit fyrst leiðina suður til Hjaltlands, har Dr. Jakobsen hevur skrivað upp orð, sum illa fær verið annað enn orðið *soppur*, og er tað nýtt í somu merking. Í Vesturhjaltlandi fann hann tað, og er tað í orðabókini skrivað *sipp*, ljóðskrivað [səp (sɪp)] og týtt: «lille visk, spec. lille høeller halmvisk; *a sipp to de calf*, lille visk (halmvisk), som gives en kalv.»

Viðvíkjandi skyldskapi við onnur orð, nevnir hann bert føroyska orðið *soppur* (visk, høvisk) og leggur hann aftur at, at tá ið *sipp* merkir «nip, slurk», er tað enska orðið *sip*. — Orðið er til enn fyri vestan, «in Walls and the West Side,» sigur Mr. T. A. Robertson, sum ættaður er úr Walls (beinari: Waas, t. e. úr Vágum). Nú er tað bert framborið [sɪp], og er tað helst ikki nýtt um annað enn hoyggj. Merkingin verður so beint tann sama, sum *soppur* vanliga hevur í føroyskum («it refers to some thing smaller than a handful, *wisp* is probably the nearest equivalent in English»). Sjálvljóðið «i» er ilt at greiða, vit skuldu væntað «o», men kanska ber til at nevna, at norrøna orðið *sorn* (før. sornur, sodnur, ísl. sofn) æt við hvørt á hjaltlendskum *sinni;* um orknoysku staðanøvnini *Sinyan* (s) innihalda sama orðið (sí Hugh Marwick, The Place-Names of Rousay, 1947, bls. 86), hevur sjálvljóðið í orknoyskum eisini verið «i» í hesum (úr geliskum komna) norrøna orði. Eg taki uppaftur her tað, sum Mr. David Murison, ið stjórnar «The Scottish National Dictionary», sigur í einum brævi um sjálvljóðið í orðinum *sip* (p): «I cannot explain the *i* vowel, as in both cases *o* would have been the regular development. If the words do indeed derive from *sop* and *sorn*, they must have been confused with some other words which have *i*, but it is not easy to see what words these would have been». Samansetingin *marsopp*, sum vit brátt taka til viðgerðar, hevur í hvussu er í oynni Fetlar «o». — Hóast sjálvljóðið í *sip* (p) er tortýtt, fær neyvan verið ivi um, at hetta er sama orðið sum føroyskt *soppur*, og um so er, hava føroyskt og hjaltlendskt eina

merking («hoysoppur»), sum einki annað norðanmál hevur. Harímóti er sama merkingin, sum seinni verður víst á, til í øllum tí geliska økinum.

II.

Ikki er alt sagt enn um, hvussu tað ósamansetta orðið *soppur* er nýtt í føroyskum. Kortini fara vit at steðga á her og gera ein tátt burtur úr samanseting, sum bæði er til í Føroyum og í Hjaltlandi. Orðið, sum meint er við, er før. *marsoppur* m., hjaltl. *marsop* (p). Vanliga orðið nú í Føroyum er tó *lættisoppur* (ella: lættusoppur), eitt orð, sum ofta eisini er nýtt í fluttari merking, t. d. um fólk, sum fáast hvønn veg tað skal vera.

Marsoppur er sjáldsamt orð nú, kanska er tað ikki til longur, eg veit tað ikki — seðlasavnið hjá orðabókini hevur tað ikki. Men onkuntíð var tað til, tí Svabo hevur skrivað tað upp nakað aftan á 1800. Í fyrsta uppískoytinum (A^1) til yngsta orðabókarhandritið (S^1) stendur tað einasta, vit við vissu vita um orðið. Har stendur so: «*Marsoppur* see *Lattusoppur*.» Tað verður so statt *lættisoppur* (lættu-), sum fær sagt okkum, hvatið *marsoppur* merkir.

Í handritinum M, sum Nicolai Mohr (1742–1790) hevur skrivað, er so greitt frá: «*Lattusoppur* s. m. sammenhængende Rogn Bælge, som meenes at være af Rognkelsen, cortices exuviæ ovorum conglomeratorum piscis cujusdam (et ut supponitur cyclopteri lumpi) in litus ejecti.» Í S^1 er týðingin henda: «Rødmagens tomme Rognpose, testæ ovorum cyclopteri lumpi, conglomeratorum, inanes.» — Nú kunnu kønir menn at siga okkum, at henda frágreiðingin er ikki bein, rættari er at týða orðið (orðini) soleiðis: «klase af konksneglens ægkapsler» (á enskum: a cluster of egg capsules of the common whelk), t. e. tyssi av (tómum) egggoymslum hjá gággu, (tómt) gággurogn.

Í orðabók Dr. Jakobsens er hjaltlendska orðið *marsopp* týtt soleiðis: «en art stærkt porøs og svampagtig hvidlig

substans af rundagtig form (kugleform), drivende i søen, sandsynl. rognpose eller sammenhængende rognbælge.» Dr. Gunnar Thorson (Zoologisk Museum, Keypmannahavn), sum er tann gággukøni maður, mær hevur hjálpt, sigur, at henda frágreiðing Dr. Jakobsens vísir skilliga, at hjaltlendska orðið er nýtt um tað sama sum tað føroyska



1. *Gágga* — Common whelk. (Buccinum undatum L.).
Teknað hevur Poul H. Winther.

(tey føroysku). — Dr. Jakobsen hevur orðið úr ymsum plássum, og sjálvljóðið í «-sopp» er ymist ljóðskrivað: ɔ, å (so av oynni Fetlar) og: ə (Sandsting, á vestursíðu Meginlands; «s» er her framborið eins og «sj» vanliga). — Eg skal leggja afturat, at hvørki í norðanmálum ella í skotskum (enskum) og geliskum er til serligt navn á tí, sum á føroyskum eitur *marsoppur* ella *lættisoppur* og á hjaltlendskum *marsop* (p).

Marsoppur er helst gamalt vesturnorskt orð, sum hjaltar og føroyingar hava havt við sær vestur um hav. Sjálvsagt er ikki heilt óhugsandi, at orðið kundi verið skapað fyri

vestan hav og verið borið, eins og tey gelisku tøkuorðini, vit hava í útbygdunum, land úr landi. Men beinast er í hvussu er at rokna við gamlari samanseting sum í øðrum orðum,ið byrja við *mar-* (marr m. «hav, sjógvur» er gam-



2. *Marsoppur* (lættisoppur), rikin upp á land. Egggoymslur frá einari gággumóður. Zool. Museum.
Egg-capsule deposited by a single female as found washed up on the sea-shore.

alt orð, sum vit mest kenna úr skaldskapi). — Nú er at spyrja: hvat merkti orðið *soppr*, tá ið henda samansetingin varð gjørd? «Hoysopp» er eyðvitað einki at hugsa um, tað sær hvør maður, sum kennir tann «rekan», vit her tosa

um. Líta vit at lutinum sjálvum (sí 1., 2. og 3. mynd). Heldur er orðið her nýtt um «fungus»-kendan vøkstur, líkum tí, sum nú eitur *sopp* á norskum, ella um hjómut og poknut evni, sum havt hevur sama navnið.

III.

Merkingin «hoysoppur», sum *soppur* bert hevur í tveimum norrønum málum, í føroyskum og í hjaltlendskum, er helst til í tí orðfellinum, sum føroyskt hevur um konu, sum skjótt fer at eiga barn: *at fara á soppin*. Eittans handrit hjá Svabo hevur hesa máliskuna, sum hann sigur vera vanliga í hvønndagsmáli: *feara aa Soppin*, komme i Barselseng, in puerperium incidere» (S[1]). Sbr. Bábelstornið (1909), bls. 84: «konan var farin á soppin.» — Eitt sindur øðrvísi eru tey dømini, eg nú nevni (tey hava kanska ikki øll gamla rót); «konan er løgst á soppin,» «hon hevur ligið á soppinum» (bæði frá dreingi úr Norðuroyggjum), «tað verður kaldligt at liggja á soppinum uppi í Fútagróthúsinum» (Ófriðaligar Tíðir, 1923, bls. 54). — Aðrastaðni havi eg hoyrt: «hon er komin á soppin.» — Sjálvur havi eg í 1922 skrivað upp frá gomlum fólki (um konu, sum skjótt skal fara at eiga): «hon er búgvin á soppin.» — Annars veit eg ikki nóg mikið um máliskur av hesum slagnum, tær, sum *soppur* er nýttur í. Til okkara nýtslu her er hetta tó nóg mikið.

Eg skal nú í stuttum nevna, hvat ið eg kenni av øðrum tiltøkum um nakað tað sama. «Búgvin at hvíla» man vera sagt víða um land, sbr. t. d. hdr. M: «Hoon eer *bygvin a kvujla*, hun er nær ved at giøre Barsel, partui proxima.» — Orðið *gólv* n. er nýtt í mongum orðfellum, t. d. «fara (falla) í gólv,» «liggja í gólvi» o. fl. Svabo hevur: «*feara uj Gølv*,» komme i Barselseng, in puerperium incidere (sbr. nú: «hon fer skjótt í gólv»); *liggja uj Gølvi*, ligge i Barselseng, puerperam agere (sbr. nú: «konan lá í gólvi»).» — Úr Skálavík eru hesi bæði dømini (fyrra munnligt, seinna úr Varðanum III 82): «at *falla* í gólv,» «matmóð-



irin er fallin í gólv;» av Oyrareingjum er hetta: «hon er *dottin* í gólv.» Í máliskuni «at *detta niður*» er orðið *gólv* ikki nýtt, t. d. «hon fer skjótt at detta niður» (onnur siga: «hon dettur niður,» t. e. tá ið hon verður «sjúk»). – Óvist er, um hetta er gamalt (kanska er tað komið úr donskum): «hon er á *fallandi føti,*» «hon er komin á *fallandi fót,*» men so verður sagt sumstaðni. Sbr. no. «fallande fot.» – Eg skal enda við tí, at onkustaðni er so tikið til um tað sama: «hon fer skjótt at *detta í tvey.*» – Vit hava eingi av teimum orðunum nevnt, har orðið *song* er uppií (liggja á song, songarkona, »matur o. s. fr.; um tílíkt í fornmálinum, sí Fritzner: barnsæng, sæng, sængarferð ella »för ella sæng(r)för, sængarkona, »rekkja), tí hjá okkum hevur orðið *gólv* og máliskur, sum sipa til tað, meiri at týða. Konan átti í fornari tíð «*í gólvi*» (á gólvi – stendur í gomlum skriftum, sí Fritzner: *golf*, og so siga íslendingar enn; norðmenn nýta «i» sum vit). Øllum hesum viðvíkjandi er nóg mikið at vísa á Fritzner (undir tí nevnda orðinum), á Jónas Jónasson: Íslenzkir þjóðhættir (Rvk. 1945), bls. 260, á Ord og Sed X (Nr. 115–133), bls. 35–36. Á hesum seinasta staðnum fáa vit at vita, hvussu føðingin kundi vera sumstaðni í Noregi upp at okkara tíð: Når dei kjende barnilt, fek dei tak i ei nerkona. So bar dei ein halmdott (sumstaðni nevndur «vonardott») inn på golvet, så stor som ein fengje. Når kona fekk flager (verkir), sette mannen hennar seg opp på eit bord, ho låg på knea på ein skammel, og han heldt henne under armane, og nerkona satt attmed. Var flagene over, eller ho vart for trøytt, hadde dei henne bort på halmdotten.» Har er eisini nevnt «eit ordlag for å føda: «*å gå i golve;*» barnet vart fødd på golvet medan kona lå på knea. Så la dei henne i senga . . .» – Eg sigi ikki, at so hevur verið í Føroyum, sum her er sagt frá, men hoysoppur hevur so ligið undir her – ella í hvussu

3. *Marsoppur* (lættisoppur).
Egggoymslur frá mongum gággumøðrum. Zool Museum.
A cluster of eggs deposited by several females.

er hjá teimum, sum skapað hava máliskuna «at fara á soppin,» neyvan hálmur, sum vit vita um úr Noregi og t. d. Onglandi (sbr. «lying in the straw»). Áðrenn eg endi hetta langa slankið, eg her gjørdi, skal eg nevna, at úr Íslandi er so sagt frá (Íþ): « . . . meðan barnið liggur hjá móðurinni, áður en búið er að skilja á milli, er kallað, að það liggi í *grasinu*, og ef barnið grætur, undir eins og það er fætt, er kallað, að það goli í *grasinu*.» Av øðrum íslendskum tilfari hesi seinastu máliskuni viðvíkjandi sendir Jakob Benediktsson mær hetta úr søvnunum hjá teirri stóru orðabókini: «Lagðist greifans húsfrú í gras og lézt barnið fætt hafa,» Islandica VII 34 (Sagan af Gríshildi góðu, eftir hdr. frá o. u. 1770); «edr hvert það (t. e. barnið) sé dáit í grasinu . . . », Lærdómslistafélagsrit XV 150. Orðasambandið hevur soleiðis verið til so seint sum í 18. øld. J. B. leggur afturat, at onnur orðasambond við grasi ella hoyggj um songarkonur kennir hann ikki.

IV.

Í norsk-íslendskum skriftum hevur *soppr* m. valla aðra merking enn «bóltur (at spæla við)». Í Bósa søgu (hdr. frá 15. øld: AM 586,4⁰) stendur (Fld. III, 196): «konungr hafdi leik þann, er *soppleikr* heitir,» og: «slo hann þá augat úr einum med *soppinum*, en annan feldi hann;» í Mariu søgu (ungt pappírshdr.: AM 634–635): «Klerkar nockurir slogu *sopp* fyrir einni kirkiu,» og: « . . . ottazt, at hann bristi þat gvll, ef hann slær optliga *soppinn*» (1034). — Systurformurin *svöppr* m. er til í 3 merkingum: 1. «svampur», t. e. spongia (? njarðarvøttur). Sí Stjórn (Unger gav út, 1862) 17: «þa baru þeir upp þannig meðr ser uáta *suoppu* ok logðu uidr nasirnar sealfum sér» (hdr. frá 14. øld). 2. «troti, okkurt uppbólgnað.» Sí Alfrædi Íslands III 79 (hdr.—AM 696 II, 4⁰ — frá 15. øld): «þat dregzt saman til bolgu eda *svopp* eda i sull.» 3. «bóltur» (t. e. tað sama sum *soppr* og — m. a. í Alexanders søgu —: *böllr*). Hettá er í 2. tátti av Karlamagnussøgu, «Af fru Olif ok Landres syni hennar»

(í útgávu Ungers bls. 64–65; hdr. AM 180 d, fol., nýtir formar av orðinum *svöppr* og einans ferð orðið *böllr;* AM 531,4⁰, hevur allan vegin hetta seinna orðið). Sagt er í søguni frá heldur bonskum bóltleiki.

Tað er eyðsæð av hesum dømum, at *soppr (svöppr)* er nýtt um viðurskifti uttan fyri Norðurlond, og sama er at siga um nýtsluna av orðinum *(sopp)* í norskum kvæðum. Í ritgerðini «Drengene på legevolden» (Danske Studier 1906, bls. 91–102) hevur Axel Olrik skrivað skilaliga um tað kvæðamotivið, sum er okkum føroyingum so kunnigt, eitt nú úr Regin Smiði, um sveinarnar, sum staddir eru á leikvøllum og fremja vápnaleik, kappin leikar so harðliga, at hinir sveinarnir setast, reiðir, og siga: «Líkari var tær faðir at hevna enn berja os so stórum.» A. O. vísir á, at motivið hevur upprunaligari viðgerð í norskum kvæðum enn í føroyskum, og har er sagt frá bóltleiki og ikki vápnaleiki; bólturin har er nevndur *sopp.* Í Sigurd Svein, sum er meinlíkur okkara Regin Smiði, er so tikið til: Sigurd slo med *leikesoppen;* S. kasta *leikesoppen,* honom lyster kje lenger leike» (sbr. Hugaball). Í Ivar Elison er sagt: «Ivar gjeng'e på leikvollen/kastar *sopp* av hendi» (sbr. Iven Erningsson; í báðum førum stendur mein av hesum kasti). – Knut Liestøl hevur í ritgerðini «Ordet sopp i folkevisone» (Maal og Minne 1919, 115–117) greitt frá hesum norska kvæðaorðinum og skoðað tað í samband við tær merkingar, sum *sopp* annars hevur í norskum.

Tað, sum nú verður sagt frá orðinum *sopp* í norskum nútíðarmáli, havi eg fingið frá Alf Hellevik, sum stjórnar Norsk Ordbok. Høvuðsmerkingin er «sporeplanten av gruppa fungi,» aðrar merkingar eru «utvokster, knusk på tre» og sambundið tí «ball til leik, kjukeball,» eisini er orðið nýtt um «rotstokk av gul nykkeblom, nytta til ball» (sí Maal og Minne 1909, bls. 85). A. H. leggur afturat, at einki dømi er til, har orðið merkir «(hø-, halm-) visk».

Orð, sum beinleiðis er ættað frá forminum *svöppr* m. (svappar; sveppir), er ikki til í nýnorskum; «spongia»

(t. e. njarðarvøttur, eisini: tváttsvampur) eitur nú[1]) sum í donskum og svenskum *svamp*, eitt orð, sum er komið av sama fyrndarsniði sum *svöppr*.

Í nýíslendskum máli, t. e. frá 17. øld upp í 19. øld, er høvuðsmerkingin, sum *soppur* hevur, «bóltur», tað, sum nú á døgum í dagligum máli mest eitur *bolti* m. Samansetingin *leiksoppur* er í Nucleus latinitatis Jóns Árnasonar (1738) nýtt sum týðing av «pila lusoria» (t. e. leikbólti), men annars er merkingin á hesum orðinum, sum enn er til, altíð «kastibløka, á donskum: kastebold.» *Soppleikur* (BH: Soppleikr m. lusus pilæ, sphæromachia) varð upp í byrjanina av 18. øld havt um spæl, har tey loftaðu steini ella øðrum bøllutum luti (sí: Ólafur Dáviðsson, Íslenzkar Skemtanir, bls. 137); merkingin «fótbóltur» (= knattspyrna) er nýgerð, og sama er við orðinum *soppleikari* m. Annars er *soppleikur* nýtt í eldri skriftum, eitt nú (1584) í Gudbrandsbíbliu (2. Makk. 4,14); aðrar eldri samansetingar eru *sopphús* (= sphæristerium, J. Árnason, Nucleus 1642) og *soppvöllur* (= sphæristerium, Nomenclator, ÍB 77 fol. 128 og 197). Ein samanseting er eftir at nevna, B H: *Soppdrepa* f. «funda, instrumentum qvo pila mittitur» (t. e. «bólttræ»), sbr. B H: *Knattdrepa* f. (eisini í Víglundar søgu, sum helst er frá 15. øld). – *Soppur* (B H: «Soppr m. pila, sphæra; vid. *hnöttr* v. *böllr*») er í 17. øld eina ferð nýtt um tann (blásta) bjølgin, sum nevaleikarar (pugiles) í Rómaborg høvdu at venja seg á. Tað er í Nomenclator Hadriane (ísl. týðing av latínskari orðabók, frá o. u. 1630, ÍB 77 fol. bls. 194): «Follis pugillatorius . . . uppblasenn ledur belgur eda *soppur*.»

Í Íslandi er *soppur* fyri norðan nýtt í merkingini «flot, á donskum: flådholt» (ísl.: flá á neti). Í handriti frá seinnu helvt av 19. øld (J S 289, 8vo; óvist hvaðan av landi) stendur henda frágreiðing: «á efri þinum ýmsra neta eru hafðir *soppar*, eða sívalir hálfhnöttóttir kubbar af ýmsu

[1]) Tó hevur Strøm, Physisk og oeconom. Beskrivelse over Søndenærs fogderi (1762–69) *sjøvott* um njarðarvøtt.

trje.» Onnur snið á sama orði eru *soppi* m. og *soppa* f. Sí Blöndal, sum eisini hevur samansetingina *soppaþinur* m. Merkingin, sum orð okkara hevur í føroyskum og í hjaltlendskum («hoysoppur» ella tíl.), er púra ókent í Íslandi — sum í Noregi. —

Í orðabók Blöndals hevur *sveppur* m. — soleiðis eitur *svöppr* nú á íslendskum — eina nú burturdotna merking: «(soppr) Bold»; høvuðsmerkingin er: «Svamp (fungus)». B H hevur: «fungus, boletus.» Sama er í orðabók Jóns Ólafssonar; har eru eisini nevnd hesi sløgini: *ætisveppur* (og: æte-), *fyse sveppur*, *kerlingar elldur*. — Sjódýrið, sum danir rópa *svamp*, *havsvamp* (á latíni: spongia), eitur á íslendskum, sum á føroyskum, *njarðarvöttur*[1]) (B H: Niardarvöttr s. m. spongia), og sama orðið varð í miðaldarmáli nýtt um tann «svampin», sum Jesus drakk edikk av á krossinum, og so er enn í íslendskum bíbliumáli. Tó varð í 16. øld eisini nýtt orðið *svampur*, sí Chr. Westergård-Nielsen: Låneordene i det 16. århundredes trykte isl. litteratur (1946), bls. 333. — «Svampur» (at tváa ella turka við) eitur nú altíð á íslendskum *svampur* (B H: Svampr s. m. spongia). —

Heldur ikki íslendski formurin *sveppur* hjálpir okkum so statt at skilja, hvussu hitt føroyska orðið *soppur* hevur fingið sína merking. —

Í donskum er, tað eg dugi at síggja, einasta vissa dømi um form við «p(p)» tað orðið *sop*, sum Fejlberg hevur í jútsku orðabók síni úr Vendsyssel við merkingini «svamp, paddehat.» Í svenskum bygdamálum er til *sopp* í somu merking («svamp»). Sí Lennart Moberg, Om de nordiska nasalassimilationerna (1944), bls. 68—71. Í øðrum svenskum málum er *svamp* (nýtt um «fungus») formurin. Moberg sigur, at í merkingini «spongia» er formurin allastaðni *svamp*, og heldur hann, at orðið í hesari merkingini kundi verið komið úr týskum (t. e. av niðurtýska orðinum *swamp*).

[1]) á før. nú ofta sagt *näravøttur*, *mjäravøttur*, *mjarravøttur*, *narravøttur* o. tíl.

Eg havi hug at spyrja: man ikki formurin *svamp* í donskum og svenskum vera læntur eisini í merkingini «fungus»? Um so er, hava vit bert tveir upprunaligar formar í norðanmálum, nevniliga (no.-) ísl. *svöppr* (sprottið av sama germanska fyrndarformi sum hitt niðurtýska orðið, t. e. **swampu-)* og no.-ísl.(-før.-hjaltl.)-da.-sv. *soppr* (germ. **s(w)umpu-)*. Sí annars t. d. orðabøkur Hellquists og Torps.

V.

Um geliska orðið *sop(p)* sum í merking er so meinlíkt føroyskum *soppur* og vesturhjaltlendskum *sopp*, hava menn verið ójavnir á máli. Zimmer (Zeitschr. f. Deutsch. Alterthum XXII, 1888, bls. 275) sigur orðið at vera norr. *svöppr;* Whitley Stokes (Bezzenberger Beiträge XVIII, 1892, bls. 123) heldur tað eisini vera norrønt, vera komið av norr. *sópr* m. «kveistur, amboð at sopá við»; Craigie (Arkiv f. nord. fil. X, bls. 158) heldur tað sama: «*sopp* (ir. sk.) Visk, lille Bundt = *sópr.*» Allir hesir menn hava sæð, at orðið fekk illa verið upprunaligt írskt orð, av tí at «p» var í tí, og hava tí hugsað sær lán úr norrønum. Marstrander (Bidrag til det norske sprogs historie i Irland, 1915, bls. 126) heldur hetta vera vitleyst, eg hugsi m. a. tí at tað er so gamalt í írskum. Mac Bain (An Etym. Dict. of the Gaelic Lang., 1911) sigur so: «*sop*, a wisp, Ir. *sopp*, W. *sob*, *sopen;* fr. Engl. *sop*, Norse *soppa.*» Um walisiska orðið, ella orðini, havi eg fingið hesa útsøgn frá R. J. Thomas (við Dictionary of the Welsh Language): «The Welsh *swp*, dim. *sypyn*, and *sopen* seem to me to be borrowings from Engl. (dial.) *sop* «a clump of flowers, plants, etc; a tump of damp hay among the dryer.» I hardly think it likely to be a Celtic word».

Um orðið *sop(p)* í (forn- og) miðalírskum havi eg fingið upplýsingar frá Mrs. Áine O'Sullivan (of the Royal Irish Academy, Irish Dictionary staff), sum óneyðugt er at leggja fram her. Eg skal nevna, at elsta dømi er úr Cormac's Glossarium, og at merkingin «a wisp, tuft» er

væl grundað. Orðið er í írskum ein kallskyns ō-stovnur. – Um nýtsluna í nýírskum, sum á mangan hátt er einum føroyingi heimakunn, skal eg loyva mær at taka uppaftur sumt, sum eg finni í Dinneen: Irish-Engl. Dict. (1947). Orðið eitur nú *sop* (gen. soip, -suip, pl. id. og -aí), og merkingin er «soppur ella hond av hoyggj, hálmi, lyngi o. s. fr.» (a wisp or handful («sop») of hay, straw, heather, etc., used to feed a cow, stop a hole, put in the boots, embody a hayrope, use as a torch . . . ;» hoyggj ella hálmur nýtt í song ella bóli; *sop feir*, beinleiðis tað sama sum okkara *hoysoppur*, er týtt: «a quantity of hay». O.s.fr. – Dwelly (The Illustrated Gael.-Engl.Dict., 1949) hevur sum høvuðsmerking úr skotska økinum (sop, -uip, pl.-an og -uip, s.m.): «Wisp, loose bundle of straw or hay.»

Er nú, sum eg havi frætt, men ikki fingið vissu fyri enn, at í írskum er *sop* sum í føroyskum nýtt um konur, ið eiga skulu, so tykir mær, at tað styðjar ætlan okkara um, at føroyingar og hjaltar hava fingið merkingina «hoysoppur» úr írskum í orði, sum í grannamálum okkara merkir «fungus, bjølgur ella bóltur.» Eitt er víst í hvustu er, at merkingarnar í norskum og íslendskum fáa illa alið av sær nýggja merking av tí slagnum, sum vit hava í føroyskum og hjaltlendskum.

Um enska orðið *sop*, sum helst er skylt við orð sum *súpa* v. og *sopi* m., og sum eftir øllum tí, vit vita, ikki beinleiðis kann vera komið inn í tey norrønu vestanmálini hjaltlendskt og føroyskt, skulu vit lítið røða, nóg mikið er at vísa á Wright: Eng. Dial. Dict. Men nevnt eigur at verða, at har er sagt, at á Isle of Man merkir *sap* nakað tað sama sum okkara *soppur* «a wisp of hay or straw»). – Skotska orðið *sup* og orknoyska *sap* «sopi» eru helst sama orðið sum tað enska, ella nær skyld tí.

VI.

Úrslitið av rannsóknum okkara, tykir mær, er tað, at øll líkindi eru til, at føroyskt og hjaltlendskt, sum í saman-

setingini *marsoppur (mar sop(p))* hava varðveitt gamla norrøna merking av orðinum *soppur*, hava tá ið orðið var ósamansett, verið fyri geliskari ávirkan. *Soppur* fekk frá írska orðinum *sop(p)* merkingina «hoysoppur» og misti soleiðis tær upprunaligu merkingarnar. Vit kunnu eisini siga, at tað írska orðið otaði tað norrøna burtur. Tann, sum veit eitt sindur um tað sløð av geliskum orðum, sum er til í málinum t.d. í Íslandi og í Føroyum, verður ikki bilsin, um hann finnur orðið fyri hoysopp at vera komið úr írskum. Tað er nóg mikið at nevna slík hvønndagsorð sum før. *tarvur* (ísl. tarfur) og før. *blak* (eldri før. *blaðak, sbr. orkn. blatho, hjaltl. bleddik), sum koma av gelisku orðunum *tarbh* og *blathach*.

SUMMARY

Early in the Viking Age there was a word in Norway soppr m. used of «fungus». A compound of this is *marsoppr «sea-fungus» which is unknown today except in Shetland Norn marsopp and Faroese marsoppur. It is used to denote a porous or sponge-like mass which occasionally drifts ashore. Zoologists tell us that such things are really clusters of (emty) egg capsules from the common whelk, though those who gave them a name can hardly have known that. Marsoppur is now virtually extinct in Faroese, having been replaced by lættisoppur, also used of anything very light or of people who are uncertain in their opinions or who have none at all. The simplex Far. soppur, Shetl. sipp [səp, (sɪp)] has a meaning, however, which ill accords with Norse, for it means a «wisp of hay», e.g. as is given to cattle. In medieval Norwegian and Icelandic writings soppr is attested only in the meaning of «ball (to play with)»; a side-form svöppr has these meanings: 1. «sponge» (Ms. from 14th C., acc. pl. uáta suoppu), 2. «tumour» (Ms. from 15th C., cf. Alfræði Íslands III 79), 3. «ball (to play with)». In medieval Norwegian ballads sopp has only the meaning «ball», in present-day Norwegian the main meaning is «fungus» with the following specialised meanings: «tumour on trees, tinder (on trees)» «ball made of polypotus betulinus Fr.», «rhizome of nymphaea» and «ball of such rhizome». In modern Icelandic down to the 19th C. soppur meant «ball» (now usually bolti),

cf. the compound leiksoppur which, however, is always used in a figurative sense. The special meaning «float (on a fishing net)» is attested from þingeyjarsýsla. In modern Icelandic svöppr appears as sveppur and means «fungus». Thus we observe that the sense «wisp of hay» found in Far. and Shetl. has no parallel elsewhere in Scandinavian, but on the other hand it is strikingly like the meaning of Gaelic sop (E. Ir. sopp). We can add that Wight, Engl. Dial. Dict. records from the English of the Isle of Man sap precisely whith the same application as in Far. and Shetl. It is possible that the Faroese expressions fara á soppin, vera búgvin á soppin — which refer to a woman about to give birth — are calques on Gaelic, but of this we cannot be certain until we have evidence that Irish uses sop in a similar way. At all events we may assert that the sense of Gaelic sop(p) «wisp of hay» entered Faroese and Shetland Norn in the Viking Age in the same way as such everyday words as Icel. tarfur, Far. tarvur — cf. Gael. tarbh «bull», and Orkney Norn blatho, Shetl. bleddik, Far. blak (older Far. *blaðak) — cf. Gael. blàthach «buttermilk».